VIÐMERKINGAR

# POLUNG & Ung Í Havn

**Johan Mortensen**
*Valevni Tjóðveldisflokksin til Býráðið*



VAL04

Sjálvur var eg Hoydølum í 70unum tá ungdómsuppreisturin fór um allan heim og setti spurnartekin við allar myndugleikar, fyriskipanir og vanahugsan. Tjak og støðutakan um Vietnamkíggið, heimspolitik og moral, tjak og visiónir um Føroyar. Engagement og persónlig støðutakan.

Føroyskur ungdómur er ídag ó-engageraður í samfelagsviðurskiftum. Ung ídag eru alt ov politisk korrekt, undirbrotlig fyri myndugleikum og apatisk yvirfyri vinnulívinum, Tað er heldur ikki so lætt at vera ungur ídag og at skulu hava høgar karakterar fyri at "blíva til nakað," helst fulltrúði í almennu fyristingini við pensión og vera tjekkaður og coolir og fínur og so blíva dismissaður og frustreraður .Ung ídag eru líkasæl við Løgtings og Býráðs-limum, troytt av livibreyðspolitikarum uttan karismu og visiónum og sum bara hvørt fjórða ár hava áhuga fyri teimum. EMINEM og RAMSTEIN og SMIRNOFF er sku nógv feitari enn parlamentarisku Føroyar.

Valrættaraldurin og koyrikort skal setast niður til 16 ella 17 ár. Er tú nóg gamal at gjalda skatt skal tú eisni hava rætt at atkvøða. Skiljið ikki at tað skal verða so torrørt við einum spælistaði í Havn. **Müllers Pakkhús** vildi verið væl hóskandi og **Móttøkuhúsið hjá Býráðnum** ein ófør ungdómscafe. Bæði húsini standa tóm megin partin av árinum, so tað skuldi verði lag á manni.

Tað er hugaligt at **POLUNG** verður virkið. Spælistøð og kollegiðir eru sjálvsøgd, men eg vóni at POLUNG eisini fer at gera sær nakrar tankar um hvussu hetta land skal byggjast. Skulu vit verða ein sjálvbjargin, stolt Tjóð við einum altjóða vinnulívi mannað við ungum, ambitiøsum profittskapandi føroyingum ella ein patetiskur almannaklientur í Norðuratlantshavi har danskir provokerandi muslimar seta dagsskránna…… ååhh, gå hjem og vug !

# Býráðs-imperialisma

**Hanus Vang**



**1. partur**

Í 1980 komu Hoyvík og Hvítanes uppí Tórshavnar Kommunu, og síðani eru vit undirløgd avgerðir býráðsins uppá gott og mest ilt.

Ongin fólkaatkvøða var um samanleggingina, hvørki her ella har. Teir arbeiða útfrá at demokrati er alt ov trupult og drúgvt. - Tá man hevur maktina.

Nú tjúgu og fýra ár seinni kann á mongum økjum sannast at vit vórðu "bóndafangaði" so dyggiligani.

Mafiur í Ruslandi og aðrastaðni kundu helst fingið væl av íblástri í Havn.

**SANDVÍKAR**
Ein av allar ljótastu gerðum teir fremja er at taka øki í Sandvíkum til skjótivøll. Ein skjótivøllur kann gerast næstan hvar sum helst, men tað eru bara einar Sandvíkar.

Tær eru eitt ótrúliga vakurt og deiligt pláss. Fyri fólk, fugl, seyð og komandi ættarlið.

Sigast skal at tær eru einasta lætt atkomuliga fjøruslætta pláss her á leið. Eitt guðs givið sálarbótarøki (ella rekreativt øki). Men tað røkkur meðalmeðviti í býráðnum ikki til at fata. Ei heldur hjá landsbýarskipanarmyndugleikan um ella í yvirófriðingarnevndini.

Og óndskapurin toppar nú teir eisini fara at hegna fjøruna frá Sandvíkaryssuni og næstan inn til Víkina Føgru, saman við slættanum. Fyrndargamla rættin verður hegnað frá sum ein blindtarmur í skjótiøkinum.

Soleiðis verður fjøran totalfriðað fyri fólk, seyð og fugl. Hetta er álvarsligt brot á galdandi lógir, lunnindir og siðvenju, tí fjøran altíð hevur verið almenningur, har øll hava ávísan rætt.

Tá fer at liggja sera væl fyri at hegla alt til við blýggjhøglum og leirdúgvuskørum.

Og ferðaleiðarar fara at kunna greiða fremmandafólki í bussunum frá hvussu væl vit í Tórshavnar Kommunu duga at røkja okkara fagrastu náttúruvirðir.

--------

Í summar komu ternurnar í stórum meingi aftur í Sandvíkar, eina mest tí vit við dyggari løgregluhjálp hava hildið ólógligu skjótingini burtur í níggju ár.

Men hvat fara ternurnar at gera tá skjótingin byrjar aftur?

Og Jan, Marius og Simmi halda seg helst vera klókari enn ternurnar. Halda seg í minsta lagið hava rætt til hvat sum helst, fram um allar aðrar verur.

Men tá teir sleppa hetta, so mugu teirra avvarðandi myndugleikar vera eins sørir fyri klókskap og meðvit.

**- framhald.**

# Búskaparáðið og ILA

**Bjørn Harlou**
*FO-335 Leynar*
*bharlou@post.olivant.fo*



Búskaparáðið har både ret og pligt til at vurdere den indflydelse, som ILA har haft på økonomien i færøsk fiskeopdræt og på den færøske samfundsøkonomi i det hele taget. Men, når Búskaparáðið og andre økonomer udtaler sig om, hvordan ILA kunne være undgået, og hvordan bekæmpelsen af ILA burde være foregået, er det omtrent lige så interessant, som hvis ortopædkirurgerne på Landssjúkrakusi? havde udtalt sig om, hvordan Norrønas havari kunne være undgået, og hvordan skaderne på skroget burde repareres.

Det gør ikke sagen mindre interessant at nyhedsmedierne ukritisk viderekolportere Búskaparáðiðs kritik af ILA bekæmpelsen. Den næste "avis-and" bliver vel dyrlægers vurdering af, hvornår eller hvordan privatiseringen af Føroya Banki burde finde sted.

# Júmen, tjóðveldið hevur danskan limaskap í Norðurlandaráðnum!

**- og hví allatíðina renna undan samleikanum heldur enn opið og erligt, andlit til andlit at siga sum er?**

**Øssur D. Jacobsen**



Høgni Hoydal var nú skjótur í blekkhúsið at bera í bøtuflaka fyri, at hann er danskur varalimur í Norðurlandaráðnum.

Tað er áhugavert, hvørjum hann nú tænir. Løgtingið valdi so aðrar í sessin at umboða Føroyar.

At HH eisini er í politiskum skrásettum parlagi við Eindarlistan er ikki so nógv at siga um. Tjóðveldið luttekur allastaðni uttanlanda við uttasta vinstra. Tað er ikki so langt síðani, at fremsti gestarøðarin á landsfundi hjá Vinstri-Grønu í Íslandi var tjóðveldismaður, nevniliga Torbjørn Jacobsen, verji floksins fyri Fidel og Che.

At so HH nú kókar alt niður til tekniskt samstarv á danatingi eru kávalótir. Eingin hevur forðað tjóðveldinum farnu mansaldrarnar at samstarva aðrar vegir, men tað hevur ongantíð verið aktuelt - av givnum orsøkum, sjálvsagt. Nú er so HH varalimur fyri Line Barfod úr Eindarlistanum. Sjáldsom "teknisk" varalimaskipan má sigast, har varalimurin, sambært HH, ger av, nær hann møtir. Vanliga møta varalimir bara, tá valdi limurin hevur forfall.

Einki varð avdúkað undan fólkatingsvalinum í 2001. Síðani hevur Tjóðveldið:

- givið seg undir (undirskrivaði) donsku grundlógina,
- saman við norðuratlantsbólkinum tryggjað sær milliónaupphædd úr danska ríkiskassanum (annars hevði flokkurin kanska verið farin á húsagang),
- verið í valsamgongu við m.ø. SF (sosialistunum), Eindarlistanum (gomlu kommunistunum),
- osfr.

Sagt verður, at Tjóðveldið ikki atkvøður í fólkatinginum. Men tað er fupp. Tað ber snøgt sagt ikki til at vera uttanveltaður í parlamentariskari forsamling.

Tí, velur tú ikki at atkvøða, ja, so stuðlar tú meirilutanum. Sama skipan sum í løgtinginum.

Einasti máti **ikki** at blanda seg í danskan politikk er at halda seg burtur haðani.

HH sigur í blaðgreinini, at undirritaði er fyrrverandi løgtingsmaður. Ja, rætt er tað. Munurin er bara, at í teimum døgum vóru tjóðveldismenn so frægir, at teir stóðu við sínar sosialistisku loysingarhugsjónir. Men einki er broytt - gamalt vín á nýggjar fløskur.

Allir flokkar á løgtingi samstarva við flokkar aðrastaðni, so hví kann Tjóðveldið ikki siga sum er? Opið og erligt, andlit til andlit, sum tikið plagar at vera til.



VIÐMERKINGAR

# Sjálvandi skal tað loysa seg at arbeiða

**Jóhan Carl Dam**
*arbeiðari*



Tað skal loysa seg at arbeiða. Hvussu ofta og leingi hava vit ikki hoyrt politikarar og onnur siga hesi orð. Og eru tey í roynd og veru góð og fjálgandi. Men tey eru tíverri ikki galdandi fyri okkum, sum byggja tilveruna á arbeiðsmannalønina. Politikararnir hava boð uppá, hvussu teir kunnu hjálpa teimum, sum vinna meðal- og háinntøkurnar at fáa meira burturúr, men ikki tá tað um lægstu inntøkurnar ræður. Heilivágurin er skattalætti, og tá láginntøkurnar gjalda lutvíst lítið í landsskatti, ber ikki til at hjálpa hesum við skattalætta. Og tað vil aftur siga, at tað ber ikki til at hjálpa teimum við skattalætta, sum størsta tørvin hava fyri hjálpini. Skattalættin er als ikki fyri láginntøkurnar. Og vit eru mong, sum standa spyrjandi. Hví hjálpa teimum, sum vinna 4, 5, 6, ella 700.000 og ikki teimum, sum liggja niðan fyri 200.000? Hví er tað so átroðkandi í hesum trongu tíðum at linna mest um hjá teimum, sum hava mest, meðan tey, sum mangla mest, fáa minst? Hetta samstundis sum politikarar og arbeiðsgevarar tosa í fullum álvara um lønarsteðg. Nei, eingin er eina løtu í iva um, at sokallaða bjargingarætlan landsstýrisins fer at leggja enn størri byrðar á tey lægsløntu. At ætlanin fyrst og fremst fer at víðka gjónna millum tey ríku og tey, sum valla hava til lívsins uppihald.

**Hugsið um arbeiðaran**
Teir, sum sita við landsins leiðslu, hava ikki tey lægstløntu fremst í huganum. Fólkaflokkurin hevur so ongan tíð havt tað, meðan Javnaðarflokkurin bert tykist vera arbeiðaravinur í andstøðu. Vit síggja javnaðartingmenn gráta krokudillutár í út- og sjónvarpi, um at teir eru ímóti skattalættanum, men at teir kenna seg budnar av avtaluni. Hví tramin gera slíka asosiala avtalu?

Um javnaðarmenn eru veruligir arbeiðaravinir, so kunnu teir uttan nakað "gera avtalur" við Fólkaflokkin og Sambandsflokkin um at hjálpa arbeiðar-anum. Eisini tá tað um skattin ræður. Tað ber til at broyta skattalógina soleiðis, at yvirtíðin hjá einum arbeiðsfólki ikki verður skattað harðari enn onnur inntøka. Sum er loysir tað seg ikki at arbeiða yvir, tí hesin parturin av inntøkuni verður etin upp av skatti. Eisini eiga politikarar at syrgja fyri, at arbeiðarin fær eins góðar yvirtíðarsømdir (gjøld) sum tey alment løntu fáa.

Góðu politikarar, eru tit arbeiðaravinir, so hugsið um okkum heldur enn at hjálpa teimum, sum longu hava nokk og kanska meira enn tað.

Ein av grundgevingunum fyri at veita teimum betri stillaðu skattalætta er, at so fara hesi at nýta peningin sum íløgur í verandi og nýggjar vinnur. Slutur og vrøvl. Ikki ein av króna av teimum, sum tey vælbjargaðu fáa meira útgoldið, fer til slíkt. Peningurin endar í kassanum hjá Føtex í Keypmannahavn og hjá matstovueigarum í Suðurevropa. Restin verður sett í bankan á privata 60-ára uppsparing. Nei, skattalættin fremur einki vinnulív. Nógv størsti parturin fer til forbrúk av innfluttum vørum, til tænastur, sum flestar verða keyptar uttanlands.

**Tryggið okkara løn**
Politikararnir kunnu eisini gera nakað, sum fer at gagna okkum øllum. Tað er at seta í verk príseftirlit, eitt príseftirlit, sum veruliga hevur eftirlit við okkara krambakallum. Eitt eftirlit sum forðar teimum í at stinga av við hvørji einastu lønarhækking, áðrenn hendan er komin í lønarposan. Príseftirlitið, sum var, meira spurdi handilslívið til ráðs, enn hevði veruligt og effektivt eftirlit við teimum. Ein arbeiðarafamilja við børnum er so tengd at vøruprísum, at hesir kunnu avgera, um tey hava ráð at liva.

Eitt virkið og effektivt príseftirlit nýtist ikki at merkja ein stóran og dýran stovn. Sjálvur havi eg fleiri ferðir skotið upp, at vit lata fólk, sum hava roynt at hildið hús við lítlum pengum, fremja hetta eftirlitið. Ikki er neyðugt at nýta akademiskar útbúgvingar ella líknandi. Nei, latið fólk, sum kenna støðuna hjá barnafamiljum, fara í holtur við hasar kremmararnar, hvørs fremsta dygd er at smyrja tjúkt uppá.

So leingi sum lønirnar eta allan lønarvøkstur og helst meira enn so, kann alt tos um hækkingar og lættar halda uppat. Fer arbeiðarafamiljan ikki at fáa sína løn tryggjaða, so fer alt politikararnir annars siga um hetta mál, bert at vera uttanum tos og fjákalótir.

**Gloymið trípartasamráðingarnar**
Sjálvandi skal vinnulív okkara vera kappingarført, men tað skal sanniliga ikki bara vera arbeiðarin, sum tryggja kappingarførið. Skulu vit bera boð í bý hvat vinnuligari kapping og fótafesti viðvíkur, so er so ómetaliga nógv annað enn bara lønin at hugsa um. Her er so nógv at tríva í, so nógv at siga við okkara vinnulívsfólk og politikarar, at vit lata tað liggja hesaferð. Eg vil bara siga tað, at arbeiðsgevarar og politikarar skulu ikki trúgva, at teir kunnu nýta okkara løn sum trumf í rossahandlum, sum bara fara at geva arbeiðsgevarunum fyrimunin. Og eiga fakfeløgini ikki eingang at hugsa um at gerast partur í trípartasamráðingum. Vit síggja longu nú, hvussu ilt politikarar hava við at geva teimum lægstløntu nakað sum helst. Og vit eiga at ansa eftir ikki at lata teir tvinna lønir og skatt saman. Skatturin er bert eitt av mongum avgjøldum, sum politikarin kann leggja á herðar okkara. Nei, latið okkum stríðast fyri at tryggja og betra korini hjá teimum lægru løntu. Tey bera sín, lutvíst alt ov stóra, part av samfelagsbyrðuni, og støðan í samfelagnum fer altíð at verða mett eftir, hvør støðan hjá teimum lægru løntu er.

Gloymið tí alt um trípartasamráðingar. Hesar fara bert at koma arbeiðaranum aftur um brekku. Tær fara bert at breiðka gjónna enn meira. Politikararnir eiga eisini at gloyma alt um skattalættauppskotið, sum liggur á borðinum í løtuni. Nýtið heldur peningin øðrvísi og skilabetur. T.d. til at tryggja lægstu lønunum munandi.

# FØROYAR HELLA!

**Hanus Vang**



**Býráðs-Imperialisma 2. partur.**

**ÚTSTYKKINGAR**
Tá Býráðið í sínum "vísdómi" ger útstykkingar, oyðsla teir so við lendinum at tað sær út til at teir halda Føroyar eru víðari land enn eitt nú Ísland.

Men tað passar ikki! Tí Føroyar eru næsttættast fjølbygdar av Norðanlondum.

Í Hoyvík verður alt ið hellir meir enn eini 20 stig lagt út til "fríøkir". Ella rossabeitir.

Men Býráðið eigur at vita at Føroyar hella, tí tað síggja øll hvønn dag.

Nú haldi eg meg hava funnið útav hví at onki verður bygt á lendi við vanligum halli.

Tað er tí at tað als ikki er Býráðið ella tekniska "umsitingin" íð "menna" býin, men eitt danskt ráðgevingarfelag, sum hevur alla ávirkan og avgerðarrætt.

Og sum kunnugt er Danmark av allar sléttastu londum. Á henda hátt er føroyska fólkasálin als ikki við til at gera av hvussu vit mynda framtíðina í bústaðarbyggingingini í Suðurstreymoy.

Fyri miljónir árliga lata vit útlendingar skalta og valta við dýrabarum lendi.

( "der udstykkes ikke på skrånende terræn" )

**BÝRÁÐIÐ LUMPAR SÆR OGN!**
Hoyvíkshagin er vorðin eitt sjálvtøkuborð hjá dýrum donskum ráðgevarum, býráðnum og onkrum býráðslimi.

Teir skitsa eitt sindur á eitt kort, og keypa stóra vídd í senn til grundstykkir, vegir, spælipláss, stovnar og áðurnevndu hellandi fríøkir.

Tá fólk keypa jørð til stykkið gjalda tey munandi meiri fyri fermeturin enn Býráðið gjørdi. Munurin fer til at gjalda ta jørð í fer til alt rundanum. Men tá avtornar stendur Býráðið sum ognari av lendinum til alt uttan grundstykkini. Tann íð gjaldar alt átti at átt jørðina.

Man tað vera legalt at lumpa smábarnafamiljur?
Kanska var eins frægt bara at tikið býráðið heilt av og síðani lati Rambøll Nyvig í Hørsholm stýrt øllum býnum.

Tí í "Handlingsplan for Thorshavn Kommune" áseta teir tó at onki skal gerast 100 metrar frá sjóvarmálanum. Og har sæst at teir hava teknað og friðað Sandvíkar.

**framhald.**

# Tú mást ikki... binda niður seyð

**Jenis av Rana**
*Løgtingslimur f. Miðflokkin*



Blakkaveðrurin vá 66 pund, nakað minni enn væntað, men ikki eitt pund ov lítið taka vit atlit fyri heilsuni. Tungur var hann at fella, og ikki fekk eg meg at binda hann, áðrenn seinasta skotið fall og vit báðir, bróður, lyftu hann á flettiborðið.

Tíma seinni, afturvið døgurðanum, tosaðu vit um seinasta kravboðið frá heilsufrøðiligu- ikki at binda niður seyð og als ikki at stinga. Øll tøkk til tey fyri hetta. So ringdi fartelefonin, óvæntaðir gestir, Danmark radios radioavis. Teir bóru stórtíðindir og ynsktu viðmerkingar til hesi. Danskur politikkari, og ditto kvinnufelagsskapur, savnaðu saman pening føroyskum kvinnum til hjálpar, so hesar "kunnu sleppa til móðurlandið", so teir har kunnu fáa beint fyri størri parti av komandi ættarliðinum enn nøkur, við verandi lóggávu, halda seg kunna her heima.

Tvær nýggheitir í somu viku, ansa tær fyri ikki at binda niður seyð og vælkomin til Danmarkar at beina fyri tí ófødda. Danir gjalda bæði ferð, uppihald og kostna til "sjúkrahús".

**Qou Vadis Føroyar?**
Hvar enda vit føroyingar?

Eins óvirðiligt tað vildi verið at evna til eina lóg, sum hevur við sær at føroysk hjún enda uttanlands at fremja fosturtøku, eins óvirðiligt er at sleppa komandi føroyska ættarliðinum, og foreldrum tess, upp á fjall, við ikki at veita teimum hjálp við tí trupulleika, sum ger at nøkur teirra síggja fosturtøku verða eina loysn.

Fosturtøku verður ongantíð ein loysn fyri barnið!- hví verður tað gloymt? Hví verður barnið nærum ongantíð umtalað av teimum, sum tosa fyri fosturtøku?

At beina barnið burtur kann sammetast við at viðgera symptomir heldur enn sjúkuna- og tað verður vanliga av øllum, lærdum og leikum, mett høpisleyst.

Mamman, pápin, barnið, familjan- øll hava uppiborið samfelagsins hjálp við tí trupulleika, sum drívur tey so langt, at tey velja at leita upp fólk, sum, ístaðin fyri at hjálpa, miskunnarleyst bjóða sær at leggja stein oman á byrðu teirra. Tey hava uppiborið samfelagsins treytaleysu hjálp, kosta hvat hon enn vil, at bera í heim tað barn, sum um nøkur ár skal manna skúlar okkara og síðani gerast grundarstuðulin undir framtíðar Føroyum.

p.s.
Ímynda tær at vísindin um nøkur ár boðar frá, at prógv nú eru fyri, at barnið í móðurlívi bæði kennir pínu og angist, tá roynt verður at tína tað? Hvussu fara ættarliðini tá at meta um okkum, okkum sum loyvdu hesum at henda. Eg vænti, at andstygd teirra verður verri, enn okkara er í dag um menn sum Hitler og Stalin.

**jenis**